# Borgarstjórar í Vágum ivasamir

**Spurningurin um at leggja allar kommunurnar í Vágum saman hevur ikki verið viðgjørdur í størru kommununum heiman fyri vatnið**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Kommunusamanlegging hevur ikki verið viðgjørd í Miðvágs ella Sandavágs Kommunum, siga borgarstjórarnir í Miðvági og Sandavági.

Eftir fólkaatkvøðuna í Bíggja Sóknar Kommunu leygardagin, segði borgarstjórin i kommununi, at tað næsta stigið eigur at verða ein stór felagskommuna í Vágum, har allar kommunurnar verða lagdar saman.

Borgarstjórin í Sørvágs Kommunu, Eivin Jacobsen, mælti til, at málið verður tikið upp, men metti samstundis, at tað er rætt at bíða við at taka nakrar avgerðir, tí tað er so lítið eftir av valskeiðnum, at tað er ikki rætt av bygdarráðunum, sum bara hava nakrar mánar eftir av skeiðnum, at taka so týðandi avgerðir. Hann metti tað rættari, at avgerðirnar bíða eftir nýggjum bygdarráðunum, sum skulu veljast í heyst.

Borgarstjórarnir í hinum báðum stóru kommununum í oynni eru samd við honum í hesum sjónarmiði.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at hon metir ikki málið hava nakran skund nú. Hon mælir eisini til at bíða til eftir kommunuvalið komandi.

Bygdarráðið í Sandavági hevur ikki viðgjørt spurningin, sigur hon. Tí vil hon ikki gera viðmerkingar vegna bygdarráðið. Men persónliga sigur Rósa Samuelsen seg halla til eina samanlegging av øllum kommununum í oynni, um smanalegging skal koma upp á tal.

Her er borgarstjórin í Miðvágs Kommunu, Jóan Pauli Frederiksen, ikki samdur.

– Skal talan verða um kommunusamanlegging í Vágum, eigur tað helst at vera millum Miðvágs og Sandavágs kommunur, heldur hann.

Tó leggur hann dent á, at hann tosar bara vegna seg sjálvan. Heldur ikki bygdarráðið í Miðvági hevur viðgjørt hendan spurningin, so hann hevur onga almenna viðmerking frá kommununi.

Persónliga heldur Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvágs Kommunu, ikki, at allar kommunurnar í Vágum skulu leggjast saman. Hann metir, at samstarv er betri enn samanlegging, sum hann tekur til.

Jóan Pauli Frederiksen vísir til samstarvið, sum kommunurnar longu hava í Felagskommununi um eitt nú ellisheimið. Tað gongur væl, sigur hann, og heldur, at soleiðis kundi eisini verið samstarvað um onnur ting.

– Vit eiga heldur at taka ávísar uppgávur og leggja tær sum ein yvirbygning oman á kommunurnar, sigur borgarstjórin Miðvági.

Tað verða ov nógv lokal mál at taka støðu til, sum tey einstøku bygdarráðini sjálv klára betri enn eitt stórt sentralt ráð, heldur borgarstjórin í Miðvági. Størru bygdirnar klára sum er sínar uppgávur rímiliga væl, sigur hann og metir, at tað verður betri fyri trivnaðin í einstøku bygdunum, um tær halda fram sum sjálvstøðugar kommunur.



*Miðvágur og Sandavágur eru besta boðið, skal talan verða um fleiri kommunusamanleggingar í Vágum, heldur borgarstjórin í Miðvágs Kommunu*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági heldur, at skal samanlegging koma upp á tal, er best, at øll oygging verður ein kommuna*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvági, er persónliga ikki fyri eini stórari kommunu í Vágum. Tær einstøku bygdirnar klára best at stýra sær sjalvum, tí har kenna fólk best lokalu viðurskiftini, sigur hann*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Ellisheimið bíðar

**Ætlanin um at byggja Ellisheimið í Vágum út bíðar eftir avgerðum frá onkrum av kommununum í oynni**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Arbeitt verður við at víðka Ellisheimið í Miðvági við umleið 10-15 búplássum. Bíðað verður nú eftir eini endaligari ætlan frá Felagskommununi, so søkjast kann um almennan stuðul, sigur stýrisformaðurin fyri Ellisheimið.

Dánjal Christoffersen, sum er formaður í stýrinum fyri Ellisheimið, sigur, at onkur kommuna í Vágum hevur samtykt orðingina, men at onkur enn ikki hevur svarað. Tá allar kommunurnar hava sagt sína hugsan og helst góðtikið ta ætlan, sum fyriliggur, er klárt at søkja um íløgustuðul frá tí almenna, so farast kann í gongd við útbyggingina sum skjótast.

Skitsuprojekt er gjørt, so nú verður bara bíðað eftir eini avgerð frá Felagskommununi í Vágum.

Arbeitt verður eisini við at finna eina felagsloysn fyri heimrøktina og heimahjálpina í oynni, sum ætlandi skal samskipast, sigur Dánjal Christofferen.



*Arbeitt verður við ætlanum um at byggja Ellisheimið í Miðvági út við umleið 10 -15 búplássum. Eisini verður arbeitt við at samskipa eldrarøktina í Vágum*



# Íbúðarbygging í Klaksvík byrjar

**Týsdagin skrivaðu Klaksvíkar kommuna og Pf Domus undir sáttmála, í sambandi við, at Domus hevur keypt eitt lendi norðarlaga á Helnabrekku til íbúðarbygging. Byrjað verður at grava út eftir páskir, og væntandi verða fyrstu íbúðirnar lidnar um eitt ár**

BYGGING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Um eitt ár ella so fara nakrar nýggjar íbúðir at standa klárar á Helnabrekku. Tað er felagið Domus, sum stendur fyri verkætlanini.

Pf Domus og Klaksvíkar kommuna skrivaðu undir keypsáttmála av lendinum týsdagin, og kommunan ger arbeiðsveg til økið nú. Útgravingararbeiðið byrjar eftir páskir.

Selmar Nielsen er stjóri í Domus, og hann sigur seg vera bilsnan av áhuganum fyri íbúðunum.

– Tørvurin hevur víst seg at vera munandi størri enn vit høvdu væntað, sigur hann.

Allar 19 íbúðirnar, sum eru í fyrsta byggistiginum, eru langt síðani umbidnar, og fólk standa á bíðilista. Men hóast tað ber til at seta seg í samband við Pf Domus, tí fólk verða sett á bíðilista enn. Og um so onkur loypir frá, so sleppa fólk á bíðilistanum framat.

Eisini sigur Selmar, at um fólk ikki sleppa við hesuferð, so sleppa tey næstu ferð.

– Vit hava lendi til fleiri íbúðarbyggingar, men júst nær tað verður, tað vita vit ikki, og tað veldst sjálvandi eisini um eftirspurningin, sigur Selmar Nielsen.

Íbúðirnar koma sum sagt at liggja norðarlaga á Helnabrekku, og Selmar sigur, at tey hava lagt stóran dent á, at íbúðirnar koma at liggja í einum góðum umhvørvi.

– Tað má sigast at hava eydnast við tí fantastiska útsýninum út yvir pollin, býin og yvir á Kalsoynna, sigur hann.

### 19 íbúðir

Tá alt stendur liðugt á Helnabrekku verður talan um 19 íbúðir í støddunum frá 54 fermetrum til 108 fermetrar.

Íbúðirnar verða lyklaklárar, tá tær standa lidnar og alt økið rundan um verður somuleiðis gjørt til ta tíð. Til hvørja íbúð hoyrir ein skúrur og tveir íbúðarbygningar verða um hvørt túnið. Sostatt verða tíggju og níggju íbúðir til hvørt túnið.

Kostnaðurin á íbúðunum liggur frá 790.000 krónum, og tað heldur Selmar ikki kann sigast at vera so dýrt.

– Tú skal hugsa um, at tá tú flytir inn, skalt tú ikki nýta nakrar pengar til at gera nakað í stand. Og við 10 % í útgjaldi verður lánsavgjaldið um mánaðin 4.500 krónur netto, greiðir hann frá.

Og so leggur hann afturat, at her er jú talan um íbúðir, sum ein eigur og ikki leigar.

– So nei, eg haldi ikki, at ein kann siga, at hetta er so dýrt, staðfestir Selmar.

Sum sagt fara tær fyrstu íbúðirnar at standa klárar um eitt ár ella so. Og Selmar væntar, at innan fyri tvey ár, eru allar 19 íbúðirnar lidnar.



*Týsdagin skrivaðu Klaksvíkar kommuna og Pf Domus undir sáttmála. Domus hevur keypt eitt lendi norðarlaga á Helnabrekku til bygging av tveimum íbúðarbygningum við ávíkavist níggju og tíggju íbúðum*
*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Norðoya Sparikassi er fíggingarstovnur í sambandi við íbúðarverkætlanina hjá Pf Domus á Helnabrekku*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Fiskivinnuskúlin merkir versnaðu tíðirnar

**Nú freistin at søkja inn á miðnámsskúlarnar er úti, er greitt, at fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur fingið fleiri umsóknir til støðisárið í ár enn undanfarin. Jákup Andreasen roknar tó ikki við nógvum umsóknum frá lærlingum í ár**

ÚTBÚGVING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Umsóknirnar eru áleið tær somu í tali sum í fjør, men tað eru fleiri, sum hava søkt á skúlan til vanligu trý ára útbúgvingina, sigur Jákup Andreasen, stjóri í fiskivinnuskúlanum.

Skipanin á skúlanum er bygt upp á ein heldur øðrvísi hátt við, at til ber at taka trý ára útbúgvingina á skúlanum. Ella kann ein taka ávísar lærugreinir og ein triði møguleiki er at ganga í skúlanum, meðan ein er í læru hjá einum virki.

Í fjør nýttu nøkur hetta høvið. Tey útvegaðu sær eitt lærupláss á einum virki og tóku so fyrsta støðisárið á skúlanum í Vestmanna. Síðani verður annað árið nýtt til at arbeiða úti í vinnuni og tað triða verður so nýtt til eitt sindur av báðum.

Seks næmingar á skúlanum nýttu hendan møguleikan í fjør, men Jákup er ikki bjartskygdur um hendan møguleikan í ár.

– Soleiðis sum tíðirnar eru vorðnar, so dugi eg illa at ímynda mær, at tað verða nógvir lærlingar her á skúlanum komandi skúlaár. Støðan er versnað í fiskivinnuni, og alivinnan er jú í svárari kreppu, so útlitini eru ikki góð fyri tí, sigur Jákup.

– Tað eru fleiri yngri umsøkjarar í ár, og tað kundi bent á, at tað er ikki eins lætt at finna arbeiði í dag, sum tað hevur verið, sigur hann.

### Primitiv skúlagongd

Sum er eru umstøðurnar á fiskivinnuskúlanum als ikki góðar. Næmingarnir húsast í fýra ymiskum húsum í Vestmanna, og tað ger millum annað tað, at næmingarnir síggja ógvuliga lítið til hvønnannan.

Til dømis tá næmingarnir skulu gera onkrar royndir, so fara teir í kjallaran í einum húsum at gera tær. Og tað heldur skúlastjórin er avbera primitivt, sum hann málber seg.

Tað hevur verið upp á tal at gera ein nýggja fiskivinnuskúla, men tann ætlanin er ikki komin nógv longur enn á skriviborðið.

– Annita á Fríðriksmørk setti eina bygginevnd, áðrenn síðsta landsstýrið fór heim. Hendan nevndin hevur havt nakrar fundir síðani, og sum eg havi skilt, so verða pengar møguliga játtaðir til fyrireikingararbeiði í sambandi við ein nýggjan fiskivinnuskúla, so her er gongd í málinum enn, sigur Jákup Andreasen.

Sostatt bendir nógv á, at fyrireikingararbeiðið viðvíkjandi nýggjum fiskivinnuskúla fer skjótt ígongd, men so longi ongir pengar eru játtaðir til byggiarbeiði, so er ikki gott av vita um og nær ein nýggjur skúli kann verða veruleiki.




*Fleiri umsóknir eru til støðisútbúgvingina á fiskivinnuskúlanum í ár enn undanfarin. Hetta heldur skúlastjórin kann vera enn eitt tekin um skeivu gongdina í samfelagnum*
*Savnsmynd*